– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Sera snotilig hús við panoramaútsýni á Argjum

**Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snøgg og framúr vælhildin - sterkt og væl bygd**









### Fyrsta fatanin

Fyrsta fatanin er, at í hesi gøtuni standa eini hús, sum eru heilt serlig. Húsini standa við blindan veg Grannalagið er hugnaligt, og grannarnir eru blíðir og fyrikomandi.

### Húsini

Húsini eru 16 ára gomul, men eru dagførd og viðlíkahildin, so tey eru sum nýggj, og dygdin er avbera góð. Húsini eru nakað fyri seg og sera spennandi. Frá stovuni er útgongd til stóra altan /terassu. Runt húsini er sera snøggur garður/urtagarður við frálíkum útigólvi/terassu.

### Ljós og luft

Húsini standa væl og frítt fyri við blindan veg, omanfyri er hagin nærmasti granni. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Dagstovnur, nýggjur skúli og busssamband er nær við. Húsini hava einastandandi frálíkt útsýni yvir alla Havnina, fjørðin og yvir fjøllini norðureftir.

### Stílur og snið - inni og úti

Stílurin er nútímans lættur og ljósur. Opið er upp í tróðrið, og tað er vítt til veggja. Opni stílurin innan ger, at tú hevur gott samband við umhvørvið uttan, men hóast tað, er tað sera fjálgt inni hjá tær sjálvum. Runt húsini er garður/urtagarður, og omanfyri húsini er stór terassa, har kanst tú njóta friðin við fríu náttúruni sum einasta granna.

### Innrætting

Í miðhæddini er inngongd, durur, wc, trappugongd / gongd / hall / garderoba, køkur, borðsstova / stova við útgongd til altan / terassu, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, durur, trappugongd, stórt kamar, vaskirúm / grovkøkur, ítrivsrúm, goymslurúm, hjallur og stórt fýrrúm / kjallararúm við egnari inngongd.

### Fakta :

Adressa..............Viðargøta 58, Argir
Býggiár.....................................1993
Hæddir...........................................3
Gólvvídd..............................310 m2
Grundøki.............................500 m2
Hjallur..........................................Ja
Bilhús...........................................Ja









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**